## Mentanarhúsið fingið skeinkiloyvi aftur

Tað vakti ans, tá Mentanarhúsið í Fuglafirði misti skeinkiloyvi, tí leiðslan í húsinum av misgávum ikki hevið sent umsókn inn til tíðina. Hetta gjørdi, at lítið og onkið virksemi hevur verið í húsinum, eftir at húsið misti skeinkiloyvið. »Í dag ynskja gestir, sum ganga til slík tiltøk og annað, at tað skal kunna bera til at keypa sær okkurt leskiligt afturvið einum góðum tiltaki, sum Mentanarhúsið í mong ár hevur staðið. Nú er so skeinkiloyvi komið aftur í Mentanarhúsið. Nógv sera góð tiltøk hava verið í Mentanarhúsinum gjøgnum tíðina,og halda hesi tiltøk sjálvandi fram í Mentanarhúsinum eins og undanfarin ár«, skrivar húsið í tíðindaskrivi.



## Eik hækkar rentuna

Sum ein beinleiðis avleiðing av hækkandi rentum á altjóða lánimarknaðinum hækkar Eik Banki nú eisini sínar útlánsrentur. Øll útlán - bæði privat og vinnulig - hækka við millum 0,1 og 0,5 prosentum p.a. Rentan á 1. veðrættarlánum, sum higartil hevur verið 6 prosent p.a., hækkar við 0,1 prosenti p.a. Rentuhækkingin fær virknað frá 21. februar 2008. Eik er einasti føroyski banki, ið veitir realkredittlán til sethúsaeigarar, og tey verða ikki ávirkað av dagsins rentuhækkingum, skrivar Eik í tíðindaskrivi. Rentan á teimum lánunum er í dag uml. 5,3 prosent.

# ga hjálp í Føroyum

sum henni tørvaði.

- Skúlin vísti ein góðan vilja til at hjálpa henni, og tað hevði stóran týdning fyri okkum, greiðir Marita frá.

Framvegis royndi familjan at fáa staðfest, hvat bagdi, men tað gekk striltið.

Men so ein dagin hómaðist ein glotti fyri framman. Mest sum av tilvild komu tey í samband við danskar serfrøðingar frá psykiatrisk afdeling í Risskov í Århus. Serfrøðingarnir kannaðu Martu og staðfestu eftir lítlari løtu, at gentan hevði ADHD.

Tað var ein lætti fyri Maritu og familjuna, tí loksins var ein diagnosa sett á Martu, og so væntaðu tey, at tað fór at bera til at hjálpa henni.

- Vit fingu allatíðina at vita, at vit noyddust at bíða til tey høvdu funnið út av, hvat Martu bagdi, áðrenn hon kundi fáa nakra hjálp ella viðgerð, greiðir Marita Øre frá.

Hon heldur fram, at tað gekk tó ikki long tíð, áðrenn tey varnaðust, at hjálpin framvegis var langt burturi. Tað, at Marta hevði fingið eina diagnosu, merkti ikki, at hon fekk meira hjálp.



*Marta avmyndað saman við mammu síni, Maritu, og beiggjanum, Esmundi. Marta gongur á serskúla fyri børn við ADHD, fær viðgerð og er javnan til kanningar. Herfyri staðfestu danskir serfrøðingar, at hon eisini hevur infantila autismu*

- Vit tosaðu við donsku serfrøðingarnar og spurdu okkum fyri, hvørja hjálp vit kundu fáa, um vit búðu í Danmark, sigur Marita. Hetta vóru upplýsingar, sum gjørdust avgerandi fyri, at familjan flutti úr heimlandinum á sumri í 2004.

Tey fingu at vita, at í Danmark hevði Marta komið í serskúla, hon hevði verðið kannað við jøvnum millumbilum og skipanin bjóðaði eisini vegleiðing og ráðgeving til foreldrini.

- Tað ljóðaði sum ein dreymur, sigur Marita.

### Stór framstig

Ta fyrstu tíðina, eftir at tey vóru flutt, var tað sera rokaligt og ørkymlandi.

- Vit skuldu jú finna skúla til børnini, finna onkrastaðni at búgva og alt tað, sum hoyrir til, tá man flytur, greiðir Marita frá.

So við og við fullu børnini til – eins og Marita og Páll Sigvald eisini vandu seg við nýggju umstøðurnar.

Samstundis sum Marta fekk hjálp, byrjaði hon at gera framstig.

- Marta verður ongantíð frísk, men hon hevur tað munandi betri í dag. Hon er glaðari og fær undirvísing, sum svarar til hennara tørv. Harafturat vita vit eisini betur í dag, hvussu vit skulu handfara Martu, tá illa stendur til, sigur Marita Øre og leggur dent á týdningin av at fáa eina kenslu av, at tað verður tikið hond um trupulleikarnar.

- Vit fáa ongantíð at vita, at nú gerst ikki meira. Hava vit trupulleikar ella spurningar, kunnu vit altíð venda okkum til onkran og fáa ráðgeving. Tey hava altíð uppskot um, hvussu ein støða kann verða loyst, og tað hevur nógv at siga.

Aftan á næstan fýra ár í Danmark er Marita framvegis sannførd um, at tað var rætt at flyta. Hon angrar onki og sigur bart út, at tey flyta ikki aftur til Føroya at búgva, so longi sum onki tilboð er til Martu.

- Hóast tað kann vera long bíðitíð til tey ymsu tilboðini til vaksin við ADHD í Danmark, so hevur tað nógv at siga, at man veit, at møguleikarnir eru her. Her hevur Marta eina framtíð.



*Tað var rokaligt ta fyrstu tíðina, eftir at tey vóru flutt til Danmarkar, men nú trívast øll trý børnini, Marta, Esmund og Sigfríður, væl á flatlondum*

> *Vit fingu allatíðina at vita, at vit noyddust at bíða til tey høvdu funnið út av, hvat Martu bagdi, áðrenn hon kundi fáa hjálp*

> *Vit fáa ongantíð at vita, at nú gerst ikki meira. Tey hava altíð uppskot um, hvussu ein støða kann verða loyst, og tað hevur nógv at siga*

**Samrøða við Maritu Øre var at hoyra í morgunsendingini á Rás 2 í morgun og verður endursend í kvøld kl. 22.00**